MARIUS

# Humor, handverk og harmonika



Rockbólkurin Marius er í stórformi, nú bólkurin er komin á skránna til Summar Festivalin. Við smittandi gleði, góðum sangum og øðrvísi ljóðførum fer Marius at seta sín dám á Føroya størsta festival.

- Marius er avgjørt ein tann mest sermerkti bólkurin á føroyska pallinum. Við stuttligum og lívligum tónleiki, visti Marius seg at vera eitt satt yvirraskilsi.

Soleiðis skrivaði ummælari hjá Planet.fo eftir framførsluna hjá Marius á Asfalt herfyri.

Hans Marius Ziska er høvuðsmaður í bólkinum, sum fyri nøkrum árum síðani vann føroysku kappingina í Global Battle of the Bands. Áður hevur Hans Marius eisini verið sangari í bólkinum Flux, sum var eitt frískt lot í føroyskum tónleiki um aldarskiftið.

Marius spælir livandi og lívandi rocktónleik, og bólkurin torir eisini at nýta øðrvísi ljóðføri í tónleikinum hjá sær – eitt nú harmoniku, ukulele og trækassatrummu. Og við manningini +í bólkinum í huga, so er vissa fingin fyri kreativiteti bygdan á gott handverk

Bólkurin Marius er umframt høvuðsmannin sjálvan mannaður við góðum tónleikarum: Brandur Jacobsen, Heðin Ziska, Bjarki Meitel, Óli Olsen og Svein Gaard Olsen.

HØGNI LISBERG

# Grýtan spruttkókar

Tað er nógv vatn runnið í ánni, síðani Høgni Lisberg bukaði trummur í rockbólkinum Clickhaze. Síðani hann slepti trummustikkarunum hevur hann ment seg til ein tann besta og best umtókta føroyska tónleikaran.

Hann skrivar og spælir egnan tónleik, sum hittar bæði í Føroyum og í útlandinum, og seinasta útgávan hjá honum er eitt framúr verk við góðum og fangandi rocktónleiki.

Høgni Lisberg er ikki bara góður í studio og á fløgu, hann er eisini framúrskarandi á palli, og ein av bestu framførslunum nakrantíð á Summar Festivalinum var, tá ið Høgni Lisberg spældi í tjaldinum fyri tveimum árum síðani.

Høgni Lisberg hevur fyri kortum spælt á stórum festivali í Italia, men nú leitar hann sær á Summar Festivalin og til enn eina minniliga konsert.



GRANDMA'S BASEMENT

# Kjallarabólkur í festivalformi

**Framfýsni bólkurin Grandma's Basement, sum spælir popprock við humori, verður við á Summar Festivalinum í ár.**

**Grandma's Basement er tónleikabólkur úr Klaksvík, sum bæði hevur spælt sangir inn og havt væleydnaðar framførslur á palli. Grandma's hevur nøkur fá ár á baki, men teir hava langt síðani gjørt vart við seg við sangum sum Bangna Beistið, Minnini, Dansurin og Getze.**

**Sangirnir hjá bólkinum eru argandi, erligir og stuttligir. Teir syngja um nakað av tí, sum teir uppliva í gerandisdegnum, og tað verður gjørt við einum skálkabrosi.**

**Grandma's Basement spældi á Summar Festivalinum í fjør, og tann framførslan lukkaðist so væl, at fyrireikararnir hava sent boð eftir bólkinum at spæla aftur í ár.**






CREDO

# Aftur á slóðina

Ein leygardag seinnapart fyri fimm árum síðani fóru teir ungu tónleikararnir á pallin á Vágsbøi og spældu fyrstu uttandura konsertina har. Nú verður Credo aftur at hoyra á Summar Festivalinum, og nógv er hent síðani góðveðursdagin í 2004.

Credo telist í dag millum bestu føroysku gospelrockbólkarnar. Teir spæla framrættaðan rocktónleik og leggja dent á at hava góð løg og viðkomandi tekstir.

Fýra tónleikarar manna Credo, og teir hava allir verið við í bólkinum, síðani fyrstu fetini vóru tikin í 2003, tá ið bólkurin var við til Gospelprixið. Síðani hevur Credo spælt til nógv ymisk tiltøk, og teir hava eitt nú havt frálíkar framførslur á Fjarðafestivalinum.

Nú verða teir so aftur at hoyra á festivalinum, har teirra stóru framførslur byrjaðu fyri fimm árum síðani.

Manningin í Credo er: Hans Andrias Olsen, Alvin Ellebye Andersen, Leivur Vitalis og Rógvi Sivertsen.